# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- John dugir væl við fólki, og venjingarnar eru eisini góðar. So stuttleikin er veruliga komin aftur í aftur hjá okkum*

*Alexandur Johansen, Skála*

# KÍ leitar framvegis

**Sum skilst er eingin venjari enn áveg- is til KÍ. Trygvi Mortensen stendur aftur við stýrisvølin sunnudagin, tá KÍ vitjar hjá B71. Samstundis skrivar heimasíðan, at tað spøkir á skrivstovuni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Longu undan uppsøgnini av Tony Paris ljóðaði, at KÍ vildi hava annað hvørt Sigfríð Clementsen ella Jóannes Jacobsen at standa fyri Formula-liðnum hjá felagnum.

Sum skilst, so hava hesir báðir tó takkað nei í fyrsta umfari, tá teir í løtuni ikki síggja seg hava umstøður at átaka sær tíðarkrevjandi uppgávuna at standa fyri einum liði í fremstu føroysku deildini.

Eisini hevur verið arbeitt við eini innanhýsis loysn. KÍ hevur í Trygva Mortensen, Eyðuni Klakstein og Pæturi Clementsen tríggjar væl útbúnar venjarar, sum allir hava A-prógv. Í fyrsta umfari hevur Trygvi Mortensen játtað at taka við sessinum, til nýggjur venjari er funnin, men eisini hann hevur stóra arbeiðsbyrðu í borgarliga starvinum, og tí skal hann eisini hava sagt nei. Pætur og Eyðun eru báðir virknir innan ungdómsvenjingina í KÍ, og tí partinum vilja hvørki teir ella KÍ sleppa uttan víðari. Skal visjón 2009 gerast til veruleika, so er tað fyrst og fremst í yngru røðunum, at arbeiðið skal gerast, og tí vildi tað neyvan gagnað í longdini, um teir skifta sess í so máta. Sjálvandi er eisini møguligt, at allir tríggir A-venjararnir í felagnum í felag lyfta uppgávuna. Men við trimum venjarum kann ábyrgdarbýtið gerast rættiliga fløkt, og tí er spurningurin, hvørt hetta er nøkur haldgóð loysn.

Vit hava spurt Axel Johannessen, nevndarformann í KÍ, hvørt felagið er um at hava eina loysn tøka.

- Her og nú eru vit ikki í samráðingum við nakran venjara. Sunnudagin verður tað aftur Trygvi, sum stendur á odda fyri liðnum, og vit royna so at kanna, hvørjir møguleikar eru tøkir, sigur hann.



*Talvan er nú vaskað rein, og klokkan á vegginum hevur aftur fingið streym. Enn er tó ikki greitt, hvør skal standa á odda fyri nýggju tíðarrokningi í Klaksvík*

*Mynd: www.ki.fo*

### Spøkir á skrivstovuni

Samstundis eru menn farnir at ivast í, hvørt tað var lagnan, sum gjørdi av, at Tony Paris ikki longur skuldi standa á odda fyri felagnum.

Í øllum førum hevur KÍ-heimasíðan fanga eina heldur sjáldsama støðu við myndatólinum. Tá menn týsdagin komu inn á skrivstovuna hjá Tony Paris, stóð klokkan still á trý korter til fimm. Hvørt battaríini eru steðgað sunnudagin ella seinni, bar illa til at staðfesta, men notatini hjá Paris stóðu framvegis á talvuni, har klokkan so rámandi lýsti løtuna, har bretin fyri seinastu ferð stóð á odda fyri besta KÍ-liðnum.

Fyribils hevur Trygvi Mortensen vaskað talvuna reina, og battaríini eru eisini skift. So nú kunnu klaksvíkingar so spakuliga fara at rokna við nýggju tíðarfestingini.

## Seks pláss niðureftir

**Á nýggjasta styrkislistanum hjá FIFA, er føroyska fótbóltslandsliðið nummar 185. Næsta mótstøðulið okkara er nummar 1!**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað verður stór uppgáva, tá Italia kemur á vitjan 2. juni. Italsku heimsmeistararnir eru enn ovastir á styrkislistanum hjá FIFA. Føroyar eru hinvegin farnar seks pláss niðureftir listanum síðani apríl mánað. Einasta europiska land, sum er niðan fyri okkum á listanum, er San Marino, sum er nummar 195.

Fýra dagar eftir, at Italia hevur vitjað, er Skotland á skránni hja Føroyum. Eisini skotar standa seg væl á listanum, har teir nú hava klintrað upp á eitt 14. pláss.

Sterkasta norðanlandið á listanum er Svøríki, sum er nummar 22.

Niðanfyri er partur av listanunum endurgivin. Í klombrum er víst ratingin fyri apríl mánað.

| | |
|---|---|
| 1 | Italia (1) |
| 2 | Brasil (3) |
| 3 | Argentina (2) |
| 4 | Frakland (4) |
| 5 | Týskland (5) |
| 6 | Holland (6) |
| 7 | Portugal (7) |
| 8 | Ongland (8) |
| 9 | Spania (9) |
| 10 | Kekkia (10) |
| 11 | Ukraina (11) |
| 14 | Skotland (19) |
| 22 | Svøríki (24) |
| 23 | Danmark (22) |
| 45 | Finnland (45) |
| 49 | Noreg (49) |
| 92 | Georgia (85) |
| 93 | Litava (93) |
| 96 | Ísland (97) |
| 185 | Føroyar(179) |

# Sevilla endurvann UEFA-Cup

**Eftir brotsspørk megnaði Sevilla at basa Espanyol, sum í lítlan tíma hevði ein mann færri á vøllinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sevilla var favorittur undan dystinum, og teir tóktust í fleiri førum hava sett sigurskósina. Í fyrstu atløgu javnaði Riera leiðsluna, sum Correia hevði givið Sevilla tíðliga í dystin.

Men tá Espanyol so misti Moises góðar 20 minuttir fyri leiklok, fekk Sevilla av álvara allar trumfirnar.

Teir løgdu eisini trýst á, men kortini kom einki mál afturat í longdu leiktíðini.

Alt tóktist tó avgjørt, tá Kanoute skoraði beint fyri steðgin í longdu leiktíðini, men eftir 115 minuttir javnaði Jonatas.

Tí mátti brotsspørk til, men har var Walter Pandiani einasti maðurin, sum fekk bóltin í Sevilla málið.

Andres Palop bjargaði skotum frá Luis Garcia, Jonatas og Torrejon, og tí gjørdist hann at enda stóra hetjan. Daniel Alves var einasti spælarin, sum misnýtti fyri Sevilla, tá hann skeyt himmal høgt upp um málið. Kanoute, Dragutinovic og Puerta skoraðu.




*Palop gjørdist stóra hetjan, tá hann bjargaði trý av fýra brotsspørkum frá møddu Espanyol-spælarunum*

Espanyol-Sevilla 2-2 eftir longda leiktíð. Sevilla vann 3-1 eftir brotsspørk.

**0-1:** Claro Adriano Correia, 18
**1-1:** Albert Rieira, 28
**1-2:** Frederic Kanoute, 105
**2-2:** Domingos Jonatas, 115
**Reytt kort:** Hurtado Moises (Espanyol), 68.